# Kanada flytir aliumsiting

Myndugleikarnir í kanadiska statinum British Columbia hava nú tólv mánaðir til at taka srøðu til eina avgerð hjá kanadiska hægstarætti, sum herfyri gjørdi av taka ábyrgdina av laksaaling frá teimum lokalu myndugleikunum og at lata ríkisstjórnini umsita eitt nú aliloyvini. Tey hava teir lokalu myndugleikarnir havt síðani síðst í áttatiárunum. Norska fyritøkan Marine Harvest er tann største alifyritøkan í British Columbia, men leiðslan har væntar ikki, at avgerðin at flyta ábyrgdina og umsitingina fær nakra stórvegis ávirkan á vinnuna.



# Størri dent á toskaaling

Hóast tað hevur gingið striltið at selja tosk í vetur, heldur norski fiskimálaráðharrin, at Noreg eigur at leggja seg eftir at økja toskaalingina. Við fjølmiðlarnar sigur Helga Pedersen, at rætt er tað, at toskaalararnir hava tað heldur tungt í hsum døgum, men hon ivast ikki í, at júst toskaaling verður ein týðandi vinnugrein fram við norsku strondini í framtíðini. Ráðharrin sigur, at tann aldi toskurin verður eitt gott ískoyti til tann villa toskin, men hon leggur dent á, at tað er umráðandi, at toskaalingin er burðardygg og ikki órógvar umhvørvið.



*Tríggir árgangir ganga inni á støðini í Skopun. Her taka Edmund Nielsen og Eyðun Viderø móti nýggjum laksi av støðini við Áir*

tørvin, sigur Edmund Nielsen.

Sjálv tøkan av rognum fer øll fram norðuri við Áirnar har laksafamiljurnar eisini verða gjørdar, og soleiðis hevur tað verið so gott sum øll árini.

- Tá tað er komið hartil, at honirnar eru fram ímóti at gýta, verða tær koyrdar livandi norður til Áirnar, og har verða so rognini tikin. Samstundis verða laksirnir slaktaðir, so teir lata lív tá, um ein so kann siga, sigur Edmund Nielsen.

Smái laksurin og sílini, sum koma inn á Lívfiskastøðina í Skopun, koma eisini frá støðini við Áir, so talan er í veruleikanum um eina ringrás.

- Vit fáa tangabilar suður higar eina til tvær ferðir um árið, tí tá fiskurin er so lítil, passar nøgv í ein slíkan bil, sigur Edmund Nielsen.

So sigast má, at vit á Sosialinum høvdu valt ein hepnan dag at vitja á Lívfiskastøðini, tí júst hendan dagin fingu teir ein bil suður frá støðini við Áir við smáum laksi.

## Gott arbeiðspláss

Men hvussu eru so útlitini fyri, at kynbótaarbeiðið á Lívfiskastøðini í Skopun verður tikið upp aftur?

- Nei, tað dugi eg ikki at siga. Tað er nakað, sum vinnan og myndugleikarnir mugu finna útav. Men sum eg havi skilt, er eitt skriv sent út, sum skal boða frá, at vit mugu vita, hvar vit flóta í hesum arbeiðinum. Tað ber jú heldur ikki til at framleiða rogn her, um eingin avtakari er til tey. So tað er eitt sindur óvist í løtuni, men vónandi verður ein avgerð tikin um hetta nakað skjótt, og helst undan sumrinum, sigur Edmund Nielsen.

Tað eru fýra ársverk knýtt at støðini í Skopun, og talan hevur verið um rættiliga støðug arbeiðspláss.

– Hetta arbeiðsplássið hevur verið rættiliga gott fyri økið her, og tær skattakrónurnar, sum inn er komnar, eru helst komnar væl við. So tað er ógvuliga óheppið, um tað skal minka niður. Verður hetta arbeiðsplássið burtur, mugu tey fólkini so fara at finna sær okkurt annað, sigur Edmund Nielsen.

Framtíðin tykist eftir øllum at døma heldur ótrygg, tó at Edmund Nielsen ikki dugir at siga, hvør lagnan hjá Lívfiskastøðini í Skopun verður.

– Tað hevur í fleiri ár verið tosað um, at Sandoyggin skuldi gerast eitt lívfiskaøki burturav. Men tað tykist, sum hetta hevur verið ein undanførsla, sum nýtt er, tí tað hava altíð verið ynskir um at alt her rundan um og á oynni sjálvari. Tað ber jú ikki til at halda fólki í óvissu allar ævir, tað skuldi helst komið ein meiri skipað loysn á hesum málinum, sigur Edmund Nielsen.

Sjálvur hevur hann nú starvast á Lívfiskastøðini í út við 14 ár, og tað ger eingin, um arbeiðsplássið ikki er gott.

– Jú, hetta hevur verið eitt óføra gott arbeiðspláss, tað er vist. Og tað verður púra vist saknur í tí, verður tað burtur. Men tað er í líka stóran mun tann veruleiki, at um vit ikki ynskja at framleiða okkara egnu rogn í Føroyum, so er tað ein ógvuliga vandamikil avgerð, bert at dúva upp á onnur, sigur Edmund Nielsen at enda.



*Støðin hevur fleiri ferðir kent megina í vestanbriminum, við skaðum á bygningin sum avleiðing. Nú er lagt størri grótkast at verja fyri, so bygningurin kann standa tryggur*